Dagf. 10. apríl 2025
HMR j. nr. 25/08984-3

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-095/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um tannrøkt og tannviðgerð til eldri borgarar og til fólk, sum eru avlamin, frá Magnu Elianu Mørkøre, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu líður við arbeiðinum at kanna tørvin hjá eldri og teimum, ið eru avlamin, ið kunnu hava tørv á serligum tilboði í mun til tannrøkt og tannviðgerð?
2. Ætlar landsstýriskvinnan at tryggja, at eisini eldri, ið hava serligan tørv, fáa eitt nøktandi tilboð um tannrøkt?
3. Eru ætlanir um at tryggja góða tannrøkt og viðgerð til hendan bólk við lóg eins í okkara grannalondum?

Svar:

Til spurning 1

Eg haldi - líkasum tásitandi landsstýriskvinna í heilsumálum - at stig eiga at verða tikin til at kanna nærri, lýsa og viðgera við avvarðandi partar, tørvin á einum skipaðum tannrøktartilboði til eldri og avlamin.

Sum upplýst í fyrra svarinum, sum spyrjarin vísir til, er ein arbeiðsbólkur settur, sum skal koma við tilmæli um, hvussu børn og ung við serligum sjúkueyðkennum (syndrom) ella tannsjúkum kunnu loftast. Hetta arbeiðið er tíverri seinkað av ymiskum orsøkum. Miðað verður ímóti, at arbeiðsbólkurin kemur við einum tilmæli fyri summarferiuna.

Tá hetta arbeiðið er liðugt, eri eg sinnað, í samráði við avvarðandi partar, at hyggja at øðrum persónsbólkum, ið kunnu hava tørv á serligum tilboði, undir hesum eldri og avlamin.

Til spurning 2 og 3

Tað hevur týdning, at eldri og fólk, ið eru avlamin, fáa eitt munadygt tannrøktartilboð, sum samsvarar við teirra tørv.

Eldri fólk og fólk, ið eru avlamin, fáa ávísa tannviðgerð og tannrøkt í dag. Til dømis upplýsir Sjúkrahúsverkið, at "eldri borgarar og fólk, ið eru avlamin" verða í sambandi við tannrøkt í Sjúkrahúsverkinum innanhýsis bólkað í "eldri enn 18 ár".

Viðgerðirnar, ið verða veittar til bólkin "eldri enn 18 ár" eru fjølbroyttar, men fevna ofta um:

1) Tannrøkt hjá fólki við menningartarni
2) Fólk, ið hava serligan tørv á fullari doyving (anestesi)
3) Skurðviðgerðir innan sertannlæknaøkið, har avbjóðandi skeivleikar eru, sum dømi kann nevnast stórt undir- ella yvirbit
4) Kanningar fyri m.a. osteonekrosu, slímhinnusjúkur/broytingar, tumorar o.s.fr.

Frá ársbyrjan 2024 og higartil í 2025 hava 242 viðgerðir og kanningar verið framdar á Tannlæknastovuni á Landssjúkrahúsinum fyri aldursbólkin "eldri enn 18 ár". Tó vita vit ikki fyri vist, hvussu nógvar av hesum viðgerðum og kanningum eru veittar til "eldri borgarar og fólk, ið eru avlamin".

Tað hevur týdning sum tað fyrsta, í samráði við avvarðandi partar, at fáa eina greiða mynd av, hvønn tørv hesin bólkurin hevur, og í hvønn mun verandi tilboð ikki røkka hesum tørvi. Hetta kann síðani brúkast sum grundarlag fyri møguliga at víðka um tilboðið um tannrøkt til hendan bólkin.

Ein partur av hesum kanningararbeiði er eisini at hyggja at lóggávu og royndum í øðrum londum og umhugsa, hvussu tær kunnu nýtast sum íblástur í føroyskum høpi.

Heilsumálaráðið, 10. apríl 2025

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna